# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Jórunn Dánialsdóttir 60 ár



Í dag, mikudagin 15. apríl, fyllir listakvinnan Jórunn Dánialsdóttir í Havn 60 ár.

Jórunn er úr Havn, dóttir Elsebu, f. Wolles, av Trøllanesi, og Dánial á Dul, navigatiónsskúlalærara, í Havn. Hon er yngst av fýra systrum.

Í 1977 varð Jórunn útbúgvin handarbeiðslærarinna á Håndarbejds Fremme Seminarinum í Keypmannahavn, og var hon eitt ár á vevstovuni hjá listakvinnuni Margrethe Agger. Í 1978 fór hon at undirvísa í kreativari seyming á kvøldskúlanum í Havn til fyrst í 1990-unum. Hon hevur verið virkin í Javna, felagnum hjá menningartarnaðum í Føroyum.

Jórunn hevur skipað fyri ymiskum framsýningum í Havn sum t.d. myndaframsýning við brúðarmyndum og barnamyndum í Tilhaldinum og stóru Realskúlaframsýningini í 2007.

Í sambandi við 60 ára føðingardagin hevði hon eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík fyrr í ár.

Hon hevur áður sýnt fram í Smiðjuni saman við øðrum, men hetta var hennara fyrsta sjálvstøðuga framsýning har. Har vóru nógv ymisk listaverk, sum hon hevur seymað, broderað og málað seinastu tíðina.

Jórunn hevur altíð verið hugtikin av list og av at arbeiða kreativt. Sum skilt er hon við at fyrireika eina nýggja framsýning við uttanduramyndum av børnum í tíðarskeiðinum frá 1900 til umleið 1970.

Jórunn er gift Jóan Paula Poulsen, handilsskúlalærara úr Havn, tey eiga fýra børn: Durita (1967), Búgvi (1972), Esther Maria (1987) og Mats Andrias (1989). Barnabørnini eru: Katrin 18, Teitur 5 og Ragnar 1 ára gamal.

**-red**

## Andlát og jarðarferðir

**Cecilia Kjærbo**, Sumba, vanliga nevnd Lillan, andaðist 2. páskadag, 86 ára gomul.

**Sjúrður Jacobsen**, Tórshavn, ættaður úr Streymnesi, andaðist á Tjarnargarði 12. apríl, 79 ára gamal. Bønarhald verður á Tjarnargarði mikudagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Sjúrð kunnu lata Sjóndeplinum eina peningagávu. Konta í Eik.

## Dagurin

15. apríl. Dagurin eitur Olympia. Tær ljósu næturnar byrja. Navnið Olympia er til minnis um halga konu, sum varð tikin av døgum umleið ár 250 í Persiu.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

### 100 ára føðingardagur

Týsdagin 21. apríl verður Elsa Olsen, Argir, 100 ár. Dagurin verður hildin í Róðraneystinum á Argjum frá kl. 15.00 til 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Gullbrúdleyp

29. apríl 2009 hava Solveig og Jens Peter Arge, Tórshavn, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum leygardagin 2. mai kl. 19.00. Um tit ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tit boða okkum frá á tlf. 313173 ella 213171 innan 20. apríl 2009.

### Brúdleyp

Leygardagin 11. apríl 2009 *giftust* Eyð Svínoy úr Runavík og Jacob Andreas (Dia) Hansen úr Klaksvík.

# Edith Mørkøre í Snarskivuni

Hósdagin 16. apríl letur Edith Mørkøre upp listaframsýning í Snarskivuni í Havn. Á framsýningini verður abstrakt og ekspressionistisk list at síggja. Framsýningin er opin fram til 29. apríl.



*Edith Mørkøre*

Fernisering verður hósdagin 16. apríl kl. 16.00, har LENA Andersen luttekur við sangi.

Edith hevur verið við á nógvum ymiskum framsýningum. Hon hevur m.a. sýnt fram í Smiðjuni í Lítluvík, Ribarhús í Fuglafirði, Lions Runavík, Lions Tórshavn, Norðoyastevnuframsýningini, Hafnia, Kelduni, Gallarí Jinx, Snarskivuni, 18-25 Eik, Á torginum í SMS, Gallarí Oyggini, Gamla handlinum á Heiðunum, LM Kambsdalur, Københavns Kultur Center og Lauritz í Kolding.

Við verkunum, sum sýnd verða fram á hesi framsýningini í Snarskivuni, hevur hon arbeitt við strukturi og formum í akryli.



Evni sum viðurskifti, ið rørast í tí dagliga lívinum, hava givið íblástur til málningarnar..

Opið er meðan Snarskivan hevur opið: Mánadag til fríggjadag frá kl. 09.00 til 16.00. Tó er opið hósdag frá kl. 09.00 til 18.00.

Okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Sjúrður Jacobsen**

andaðist sunnudagin 12. apríl, 79 ára gamal.

Bønarhald verður á Tjarnargarði mikudagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Ragnhild, Marjun og Arnfinnur**

Tey, ið ynskja at minnast Sjúrð, kunnu lata Sjóndeplinum eina peningagávu, konta í Eik.

# Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Johan K. Joensen**

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Bjarna Bæk fyri troystarrík orð í kapellinum og kirkjuni.
Takk fyri heilsanir og blómur og fyri peningagávur til Leguhúsið í Nesvík.

*Familjunnar vegna*
**Fridrikka, Heini og Óli**